## Per Stig kundi velja

Nú tann danska stjórnin bleiv umskipað, varð Per Stig Møller fluttur úr uttanríkisráðnum til mentamálaráðið. Hetta var eisini tað, sum politisku eygleiðararnir í Keypmannahavn høvdu væntað, men sjálvur sigur ráðharrin, at hann fekk fleiri málsøki at verlja ímillum. Per Stig Møller sigur við kringvarpið DR, at hann gav sær góðar stundir til at taka ta endaligu avgerðina um, hvat málsøki hann skuldi velja. Hann vil ikki siga, hvørji tilnoð hann fekk, tí tað kemur ikki øðrum við, sigur hann.



## Svøltaði seg í hel

Í Kuba er tann politiski fangin Orlando Zapata Tamayo deyður eftir at hava svøltað seg í 85 samdøgur. Tann 42 ára gamli fangin bleiv fluttur úr fongslinum til eitt sjúkrahús í høvuðsstaðnum Havana, men læknarnir kundu ikki bjarga lívi hansara, sigur mannarættindafelagsskapurin Cuban Human Rights Commission. Zapata gjørdi av at svølta seg fyri at mótmæla viðurskiftunum í teimum kubansku fongslunum. Sjálvur hevði hann sitið í fongsli síðani í 2003, tá hann bleiv dømdur fyri sítt virksemi ímóti myndugleikunum.

# Kalsoyggin leggjast undir Klaksvíkar Kommunu



*Farið verður nú undir samráðingar millum Húsa og Klaksvíkar kommunu. Bera samráðingarnar á mál, verður øll Kalsoyggin undir Klaksvíkar kommunu, tá nýggj kommunustýri taka við 1. januar 2013*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Húsa kommuna megnar ikki longur at liva upp til vaksandi krøvini frá landinum, og hevur tí biðið um samráðingar við Klaksvíkar Kommunu um samanlegging. Klaksvíkar Býráð er jaligt fyri at fara undir samráðingar**

SAMANLEGGING

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tá býráðsfundur var í Klaksvík í gjár, var eitt av málunum á skránni ein møgulig samanlegging millum Húsa kommunu og Klaksvíkar kommunu.

Eftir innleiðandi samskifti millum borgarstjórarnar báðar, hevði Kristian Hansen, borgarstjóri í Húsa Kommunu, boðað frá, at kommunan er áhugað í einari samráðingartilgongd um samanlegging.

Borgarstjórin í Húsa Kommunu, Kristian Hansen, sigur, at støðan er tann, at Húsa kommuna, sum umfatar bygdirnar Húsar og Syðradal, er fíggjarliga illa fyri, og at raksturin er blivin for tungur í mun til inntøkurnar.

– Til uppgávurnar, sum liggja fyri framman, er ringt at síggja sær, at kommunan er før fyri at lyfta tær uppgávurnar, sum vit skulu, segði Kristian Hansen við Rás 2 í gjár.

### Kloakkin tyngir

Kristian Hansen vísir á, at millum tær tungu íløgurnar, sum skulu gerast, eru tað serliga kloakkviðurskiftini, sum skulu liðug í 2015, sum enn liggja á láni.

– Á Húsum er eitt sindur gjørt, men har manglar nógv, og í Syðradali er einki gjørt. So tað er ein somikið stór íløga, sum eg rokni við at kommunan ongan kjans hevur at lyfta, sum støðan er nú, staðfestir Kristian Hansen, borgarstjóri í Húsa kommunu.

Kristian Hansen sigur, at eisini í samband við skúlan, er tungt hjá kommununi at lyfta uppgávurnar.

### Tíðin farin frá smáum kommunum

Húsa kommuna er millum tær minstu í landinum, og fólkatalið í kommununi er 57 fólk, harav nógv børn eru, og sjey børn í skúlaaldri.

Tískil eru tað fáar herðar, sum skulu bera tær íløgurnar, sum liggja fyri framman.

Kristian Hansen heldur, at tíðin talar fyri, at mann skalerar saman í eina størri eind, tí at uppgávurnar, sum nokk verða lagdar út á kommunurnar, verða ov stórar fyri eina so lítla kommunu, sum Húsa kommuna er.

### Vónar loysn til næsta væl

Borgarstjórin í Húsa Kommunu sigur, at tað, sum tey stíla fram móti er, at kommunusamanleggingin verður veruleiki áðrenn næsta val, tá kommunur ikki hava loyvi at leggja saman millum tvey val.

– Vit hava tosað um, at innanfyri tvey ár, at koma á mál við einum samráðingarúrsliti, sigur Kristian Hansen.

Hann ásannar, at soleiðis sum landið liggur nú, so verður tað bert Klaksvíkar kommuna eftir næsta val, og ikki Húsa og Klaksvíkar kommuna, og at sum hann skilur á klaksvíkingum, so eru teir eisini opnir fyri at restin av Kalsoynni eisini kemur undir Klaksvíkar kommunu.

# Síggja skriftina á vegginum

**Býráðslimirnir í Klaksvíkar kommunu hava sæð skriftina á vegginum, at allar Norðoyggjar helst verða ein samlað Norðoya kommuna. Tað ásannar Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, sum er opin fyri samráðingum við Húsa kommunu**

SAMANLEGGING

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Klaksvíkar Býráð samtykti í gjár, at eftir óformellar fundir millum borgarstjórarnar í Húsa og Klaksvíkar kommunu, verður farið undir veruligar samráðingar.

– Býráðið er positivt fyri, at farið verður undir samráðingar við Húsa kommunu. Men samtykt varð, at tað skal setast ein samráðingarbólkur, sum skal taka sær av samráðingunum, sigur Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu.

Gunvá við Keldu heldur, at tað er einki minni enn natúrligt, at Húsa kommuna eisini leggur saman við Klaksvíkar kommunu, tá Trøllanes og Mikladalur longu eru komnar tann vegin.

### Samráðingar heldur enn tvang

Gunvá við Keldu heldur tað verða gott, um báðar kommunurnar fáa samrátt seg upp á pláss, heldur enn at tær verða lagdar saman við lóg, sum róð hevur verið uppundir frá landsmyndugleikanum í teimum førum, har kommunur ikki finna saman sjálvar.

– Eg haldi teir flestu býráðslimirnir hava sæð skriftina á vegginum, at Norðoyggjar verða ein kommuna, sigur Gunvá við Keldu.

Hon ásannar, at tað kann tykjast keðiligt fyri fólkini í Húsa kommunu, at tey nú skulu undir Klaksvíkar kommunu, tí tey kanska eru bangin fyri at detta burturmillum í stóru mongdini.

Men júst tí heldur hon, at man skal vera varin við at seta tíðarfreist á samanleggingina.

– Vit skulu vera varin við at skunda okkum ov nógv. Tað er betri at fáa samrátt seg til ein sáttmála, sum báðir partar eru væl nøgdir við, sigur Gunvá við Keldu.